# Íslendska flaggskipið skal fiska í Afrika



Engey er flaggskipið í íslendska fiskiskipaflotanum. Skipið er 105 metrar langt og 20 metrar breitt. Tað er nú selt einum dóttirfelag hjá Grandi í Hálandi og fer at fiska av ES-kvotum út fyri Afriku

HB Grandi, sum er størsti kvotaeigarin í Íslandi, hevur selt Engey, sum í fjør fiskaði fyri einar 140 mió føroyskar krónur, til hálendska dóttirfelagið hjá Grandi, Atlantic Pelagic BV.

Engey er flaggskipið í íslendska fiskiskipaflotanum. Skipið er 105 metrar langt og 20 metrar breitt.

Sølan merkir, at nakrir íslendskir fiskimenn, sum vóru við skipinum, eru uppsagdir.

Engey hevur frystarí og egna mjølverksmiðju.

Risastóra skipið skal nú fiska av ES-kvotum úti fyri Afriku.

Veiðan verður makrelur, hestamakrelur og sardinur, sigur felagið Grandi á síni heimasíðu.

**(-vilmund)**

# heim til 100 børn í India



va børnunum eitt veruligt barnaheim, sømiligan uppvøkstur og eina



*Maria og Marjun fóru til Indiu at vera við í barnahjálpararbeiði. Nú savna tær pening inn til at byggja børnunum í Indiu eitt veruligt barnaheim: – Vit eru væl stuðlaðar, bæði av familjum okkara, vinum, kenningum og fólki í samkomum, sigur Marjun Joensen (th.)*



*Umstøðurnar á barnaheiminum, har Marjun og Maria hjálptu til, kunnu ikki samanberast við tað, vit vanliga skila sum eitt barnaheim. Her sita børnini og eta rís, sum er høvuðsrætturin í Indiu*



*Barnaheimið er bara eitt lítið hús, sum tey leiga, og umstøðurnar eru eftir okkara mátistokki vánaligar. Nú verða so tøk tikin í Føroyum til at byggja indiskum børnum eitt veruligt barnaheim, sum verður ein sjálvsognarstovnur*

tí tey ikki hava ráð at geva teimum mat í munnin, sigur hon.

### Tvey ár á baki

Unga leirvíksgentan sigur, at Ambu hesi bæði árini hevur prógvað, at hann og bróðirin saman við bróðurkonuni gera eitt barnahjálpararbeiði, sum ger mun.

– Eg veit, at tá ið fólk stuðla hjálpararbeiði, sum er so fjart burturi, eru tað mong, sum reisa iva um, hvar peningurin fer, men nú hava vit verið á staðnum og hava tikið lut í tí arbeiði, sum verður gjørt fyri hesi børnini.

Marjun sigur, at Ambu og beiggi hansara hava øll síni viðurskifti við myndugleikarnar í lagi og tíðin, síðan teir fóru undir hetta hjálpararbeiði til frama fyri illa støddu børnini, hevur prógvað, at tað ger mun.

– Fíggjarliga orkan hjá teimum báðum er so lítil, at teir higartil ikki hava megnað at fullføra tað verk, sum er teirra størsta ynski. Visjónin er nevniliga at byggja eitt veruligt barnaheim til 100 børn, soleiðis at hesi kunnu fáa ein góðan og sømiligan uppvøkstur og eina útbúgving, so tey kunnu klára seg í samfelagnum, tá ið tey veksa til. Kravið er, at øll skulu ganga í skúla, tí hetta er grundarlagið fyri framtíðini hjá teimum.

### Stórur tørvur

Tað var Ambu, sum tók ímóti Marjuni og Mariu, tá ið tær komu longu leiðina úr London til Bangalore í Indiu, og tað var hann, sum hevði ábyrgdina av teimum, meðan tær ókendar við indiska samfelagið vóru í landinum.

– Meðan vit vóru í Indiu og gjørdu hjálpararbeiði, sóu vit, hvussu stórur tørvurin er, og hvussu stórt ynski tey, sum vit vóru ímillum, hava fyri at betra um umstøðurnar. Tí hava vit tikið stig til at savna inn pening til nýtt barnaheim – við kirkju á sama grundøki.

Marjun sigur, at tey hava møtt stórari vælvild og stórum hjálpsemi í Føroyum til tess at røkka hesum máli.

Ein konto er stovnað í Norðoya Sparikassa, og tað eru mong, sum hava valt at stuðlað ætlanini.

Hósdagin í síðstu viku, tá ið Sosialurin hevði vitjan av Marjun á redaktiónini í Klaksvík, vóru komnar umleið 130.000 krónur á kontoina, men longu sunnukvøldið høvdu tey rokkið tí fyrsta málinum, sum er at savna inn nóg mikið av peningi fyri at kunna rinda grundøkið, har barnaheimið og kirkjan skulu byggjast.

### Liðug til jólar

– Ambu hevur øll viðurskifti við einum barnaheimi upp á pláss mótvegis myndugleikunum, og tí er alt tað formella longu í lagi. Barnaheimið og kirkjan verður ein sjálvognarstovnur, góðkendur av myndugleikunum, og í reglunum verður gjørt greitt, hvussu verður við ognunum, um tað skuldi hent, at virksemið onkusvegna datt niðurfyri.

Marjun Joensen sigur, at verkætlanin við keypi av lendi, barnaheimi og kirkju tilsamans fer at kosta einar 420.000 krónur, og síðan er málið, at raksturin av virkseminum í størstan mun skal fíggjast úr Føroyum.

– Tekningarnar eru klárar, og gongst sum ætlað, standa bæði barnaheimið og kirkjan liðug til jólar í ár, sigur 21 ára gamla leirvíksgentan.

**Stuðul**

Fólk, sum ynskja at stuðla føroysku verkætlanini í Indiu, kunnu flyta pening á konto í Norðoya Sparikassa 9865 1034558.